# 21 kvinnur og 28 børn hava gist á Kreppumiðstøðini

Hósdagin 16. mars 2000 hevði Kvinnuhúsfelagið aðalfund í KFUM. Í nevndini í Kvinnuhúsfelagnum sita Edna Jørgensen, forkvinna, Kristina Ferjá, næstforkvinna, Henrid Johansen, kassameistari, Katrin Gudmundsdóttir Isfeld og Finngerð Fríðriksdóttir. Eykalimir eru Meinhild Geyti og Ása Holm Jacobsen. Í nevndini fyri Kvinnuhúsgrunnin sita Turið Debes Hentze, forkvinna, Brynhild Danielsen og Solveig Debess. Eykalimir er Ása Ellefsen. Grannskoðari og varðagrannskoðari eru ávikavist Sonja Klein og Gunnvá Haldansen.

Í 1999 hava 39 kvinnur arbeitt sum sjálvboðnar. Tær hava arbeitt í vaktarskipanini sum kvøld- og náttarvaktir, sitið í nevndum og í ráðgevingini. Felagið hevur limafund einaferð um mánaðin. Arbeiðið í Kvinnuhúsinum er fjølbroytt og vit hava brúk fyri fleiri vaktum. Hevur tú hug til hettar arbeiði, set teg í samband við okkum á tlf. 317200 og hoyr meira.

Kvinnuhúsfelagið rekur Kvinnuhúsið/kreppumiðstøðina, har kvinnur kunnu fáa ráðgeving og vegleiðing. Møguleiki er hjá kvinnum at gista á Kreppumiðstøðini, saman við børnum teirra, í styttri tíðarskeið.



*Kreppumiðstøðin í Havn heldur til í bygninginum hjá KFUM*

Aftur í 1999 kunnu vit staðfesta tørvin á Kvinnuhúsinum. 21 kvinnur og 28 børn hava gist á Kreppumiðstøðini í tilsamans 1.626 gistingardøgn. Aldurin á kvinnunum var millum 18 og 49 ár. Børnini vóru millum 0 og 16 ár. Kvinnurnar siga, at orsøkin til harðskapin er partvís uppvøkstur, øvund, undirlutakenslur, misnýtsla og ymisk mentan. Í 1999 hava 540 áheitanir verið til Kvinnuhúsið. Áheitanirnar hava verið úr 24 ymiskum kommunum. Kvinnuhúsið hevur frá byrjan í 1990 haft áheitanir frá 38 kommunum.

Framtíðarynski okkara er, at betra umstøðurnar hjá mongu børnunum ið gista á Kreppumiðstøðini. Hettar krevur, at eitt starvsfólk er sett til børnini burturav. Somuleiðis gjalda kvinnurnar fyri at gista á Kreppumiðstøðini, ynskiligt hevði verið, um hettar var ókeypis, tí kvinnurnar hava sínar føstu útreiðslur aftrat gjaldinum fyri gisting.

Vit takka øllum, sum á ymiskan hátt hava stuðla arbeiðinum í Kvinnuhúsinum.

## Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut ella mjørki í støðum. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og stundum avfall, partvís vátaslettingur. Hitin fellur niður í 1 til 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og landnyrðingi og avfall av og á, mest sum vátakavi. Hitin millum 0 og 3 stig.



Hátrýstið yvir Skotlandi stendur mestsum í stað og sendir lýggja luft av útsynningi móti Føroyum.



Hátrýstið yvir Skotlandi viknar nakað og fríggjadagin kemur eitt lágtrýst framvið Føroyum sunnanfyri.



**Hitalagið mált frá 27./03. kl 06[00]–28./03. kl 06[00]. Hitin í gjár: 5,7°C**
Minsti hiti máldur í mars: **÷8,7°** Mesti hiti máldur í mars: **12,0°**



Avfallið: 1,0 mm – **mált frá 27./03. kl 6[00]–28./03. kl 06[00]**
Avfallið higartil í mars: 111,9 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 7 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannahavn | 2 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 17 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | – |

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG




12. MAÐUR
Tlf. 213212

fk

## Vestfalskyrrindi

27. mars: Mánin longst frá jørðini
28. mars: Seinna kvarter
4. apríl: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. mar | 1:35 | 14:12 | 0:35 | 13:12 | 0:50 | 13:27 | 3:35 | 16:12 | 4:35 | 17:12 | — | 12:27 | 11:27 | — | 1:50 | 14:27 | 2:50 | 15:27 | 1:20 | 13:57 | 2:35 | 15:12 |
| 30. mar | 2:49 | 15:29 | 1:49 | 14:29 | 2:04 | 14:44 | 4:49 | 17:29 | 5:49 | 18:29 | 1:04 | 13:44 | 0:04 | 12:44 | 3:04 | 15:44 | 4:04 | 16:44 | 2:34 | 15:14 | 3:49 | 16:29 |
| 31. mar | 4:02 | 16:32 | 3:02 | 15:32 | 3:17 | 15:47 | 6:02 | 18:32 | 7:02 | 19:32 | 2:17 | 14:47 | 1:17 | 13:47 | 4:17 | 16:47 | 5:17 | 17:47 | 3:47 | 16:17 | 5:02 | 17:32 |
| 1. apr. | 4:59 | 17:26 | 3:59 | 16:26 | 4:14 | 16:41 | 6:59 | 19:26 | 7:59 | 20:26 | 3:14 | 15:41 | 2:14 | 14:41 | 5:14 | 17:41 | 6:14 | 18:41 | 4:44 | 17:11 | 5:59 | 18:26 |

Kelda: Skipalistin 2000